# Nøvn

## Ein lívsjáttandi skaldsøga

**David Johannesen, sóknarprestur í Vágum hevur givið út sína fyrstu skaldsøgu, sum snýr seg um tilveruspurningar, latnir í ein søguligan ham**

Randi Jacobsen

Fyrr í vikuni kom út skaldsøgan Dirvi til at liva, sum David Johannesen, sóknarprestur hevur skrivað.

Hann sigur, at hann leingi hevur arbeitt við hesi bók.

– Bókin er um tilveruspurningar, harundir líðingarspurningin, og eg vildi hildið, at hon er góð at lesa fyri tey, sum eru rakt av sjúku ella hava møtt øðrum álvarsligum forðingum, sigur David Johannesen.

Bókin er eisini søgulig á tann hátt, at søgan er fram undir seinna heimsbardaga, og nevndar verða hendingar frá tí tíðini.

Søgan gongur tó longur fram í tíðina, upp í sjeytiárini og tekur upp spurningar sum dálking, frið og annað, sum var nógv frammi tá og er tað enn.



*David Johannesen roynir seg nú sum skaldsøguskrivara*

– Søgan umrøður eisini okkara støðutakan til kristindómin og gevur eina positiva meting av sunnum kristindómi í víðari merking. Tí er bókin eisini ein positiv kristilig skaldsøga, sigur David Johannesen.

Hansara sjónarmið er, at kristindómur er eitt íkast til at tulka tilveruna og kærleikan, og sannur kristindómur lærir okkum at liva við tí, sum vit møta á lívsleiðini av góðum og illum.

## Merkisdagar

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 31. juli hava Sigrid og Símun Dalsgaard, Boðanesgøta í Hoyvík, verið gift í 50 ár. Tey verða burturstødd.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 13. august kunnu Ásla og Tórbjørn Poulsen í Havn halda gullbrúðleyp. Veitsla verður sama kvøld fyri innboðin. Tey sum annars hava hug at hitta brúðarparið eru vælkomin heima í Bóndabrekku leygardagin eftir kl. 15.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 10. august hava John Kári og Marianna Jacobsen Hvannasund, silvurbrúdleyp, tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar, Vestmanna, verði gift 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl. 12 til 18 í ítrottarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf. 424407.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 31. juli verður Hans Andrias Petersen, Skálafirði, 80 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. august verður Tóra Højgaard, inni á Regni, Toftir, 80 ár. Dagurin verður hildin á Vesturskin frá kl. 17.

**75 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. august fyllir Helgir Thomsen í Hvalba 75 ár. Tey, ið vilja gleða Helgir á degnum eru vælkomin heim til hansara millum kl. 14 og 18.

**75 ára føðingardagur**
Týsdagin 3. august verður Ámundur Berthelsen, Strendur fyrrv. skúlastjóri 75 ár. Hann er burturstaddur.

**75 ára føðingardagur**
21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyrustøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. august verður Michael Olsen, Klaksvík, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin í heiminum á Selheygsgøtu 10, frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 3. august verður Jórun Brekku Joensen, Klaksvík, 60 ár. Opið hús verður á Vágsheygsgøtu 13, frá kl 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Føðingar

12. juli fingu Tanja og Jan Petersen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.

21. juli fingu Anna Eiriksdóttir og Rúni Heðinsson, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

22. juli fingu Siw Mary Thomsen og Ólavur Olsen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3560 gr.

24. juli fingu Susan Djurhuus og Jóhann Wolles, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4290 gr.

24. juli fingu Birita Baldvinsdóttir Eidesgaard og Jóannis Iversen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3590 gr.

24. juli fingu Angelie Mouritsen og Jan Yttesen, Sørvági, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2780 gr.

24. juli fingu Anita og Kaj Anker Joensen, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3380 gr.

25. juli fingu Vida Sackitey Joensen og Jónsvein Joensen, Fuglafirði, tvíburðar, dreingir. Annar var 52 cm langur og vigaði 3250 gr, hin 50 cm langur og vigaði 2750 gr.

25. juli fingu Elspa E. Jacobsen og Jim S. Guttesen, Sørvági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3420 gr.

26. juli fingu Marin Elisabeth og Kristoffur Vidtfeldt, Miðvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3270 gr.

27. juli fingu Jón og Gunna við Neyst, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3150 gr.

27. juli fingu Brynhild og Jørmann Petersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3810 gr.

27. juli fingu Jensina Olsen og Tryggvi Magnussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4070 gr.

28. juli fingu Tina Ziska og Vagnur Mohr Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3680 gr.

29. juli fingu Tóra Johansen og Sverri Eriksen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4100 gr.